# Teitur á DVD



Teitur Lassen gevur í næstum DVD út við framførsluni hjá sær í Vega í desember í fjør. Konsertin varð tikin upp, og er nú ljóðblanda og klipt saman. Teitur sigur, at hann er sera vælnøgdur við úrslitið, og gleðir seg til at síggja, hvussu DVD'in verður móttikin.

Hvørji løg eru á DVD'ini er ikki ament enn. Men á konsertini spældi Teitur: Let's go dancing, Shade of a shadow, Halfway between, One and only, Sleeping with the ligths on, To meet you, You're the ocean, Rough around the edges, Josephine, I was just thinking og Amanda's dream. Umframt nýggju løgini Louie Louie, I run the Carrousel, Hanging my worries out to dry og Waiting for mars to come out. Hann tolkaði eisini Great balls of fire hjá Jerry Lee Lewis. So her er talan um nógv góð løg.

Konsertin var ótrúliga góð, millum annað hevði Teitur strúkarar við sær á nøkrum av løgunum, og tað lyfti tónleikaupplivingina.

Konsertin varð tikin upp við hondhildnum filmtóli, og hetta gevur sambært Teiti DVD'ini ein heilt serligan dám. DVD'in er klár til at verða sett í framleiðslu, nú manglar bert at seta ein útgávudag.

**nud**

# MC-Hár á íslendskari rap fløgu



MC-Hár gestarappa á lagnum »Norður«, hjá íslendska rapbólkinum Hæsta Hendin. Hæsta Hendin gav her fyri sína fyrstu fløgu út. Talan er um pop og r'n'b kendan hip hop tónleik.

Lagið »Norður« er eitt norðurlendskt samstarv, har rapparar úr teimum norðurlendsku londunum, rappa um sereyðkenni við sínum landið. Her er svenski rapparin Professor P, danski Clemens, grønlendsku Nuuk Possee, norsku Danskken, finsku Elastinen og MC-Hár úr Føroyum.

MC-Hár rappa á lagnum m.a. um William Heinesen, Regin Vágadal, heimalomb, yvirvaksnar lundar og varðar.

Tað er heimskendа danska framleiðarasamstarvið Madness for Real, sum hava lagt fløguna til rættis. Teir hava fyrr produsera m.a. Black Eyed Peas og Ice Cube og góvu egna fløgu út í 90'unum undir navninum Den Gale Pose.

**ek**

# Atlantic Music Event var sera flott



Í sera høgt viðurkenda tíðarritininum Musikeren er ummælið av Atlantic Music Event, og rósurnar eru nógvar. Blaðmaðurin Morten Madsen heldur, at tónlistarliga støðið er sera høgt, og serliga Makrel og Gestir fáa góð viðmælir.

Hann heldur, at hesir bólkar tykjast seriøsir og hava ein sera markantan profil. Hann heldur tó, at báðir bólkar høvdu uppiborðið meira enn 15 minuttir á pallinum. Hann kann tí gleða seg til at síggja hesar bólkar í Vega, har teir saman við 200 spæla í august.

Guðrun, Høgni Lisberg og 200 fáa somuleiðis góð viðmælir í greinini, sum er á síðu tvey í tíðarritinum.

Um sjálva Prix Føroyar finaluna sigur Morten Madsen, at hóast Go Go Blues vóru sera siðbundnir, so vóru teir mundandi meira sannførandi enn Eyðun og Terji, sum til samanberingar tyktust heldur profilleysir.

Musikeren hevur tilknýti til Dansk Musikerforbund, og roknast sum eitt seriøst tónleikatíðarrit. Morten Madsen sigur, at Atlantic Music Event er eitt flott tiltak, og at ein sær á føroyska tónleikapallinum, at tiltøk sum hetta geva tónleikalívinum íblástur. Hann heldur tað vera ótrúligt, at so nógvir bólkar kunnu vaksa úr so fáum fólkum.

**nud**

# 1250 x 200



Sambært sølutølunum hjá TUTL hevur punkbólkurin 200 longu selt fleiri eintøk av Viva La Republica enn av fyrru fløguni 200%. 1250 eintøk fløguni eru farin um diskin í fløguhandlunum.

Lagið Muscle Man Blað liggur nummar eitt á 15 teimum bestu, og hevur gjørt tað í fleiri vikur. Eisini á sølulistanum hjá Føroya størsta fløguhandli 3'aranum liggja 200 nummar eitt.

Fyrra fløgan hjá 200, 200% seldi umleið 1000 eintøk, og hetta er eisini høg sølutøl fyri eina punkfløgu. Men millum annað væl hjálptir av harra pop Óla Poulsen, hava teir nú skapt eina sanna hitfløgu.

**nud**

# Høgni Lisberg nýggja fløgu

Høgni Lisberg gevur í næstum sína næstu fløgu út. Á konsertini í Gimle í Roskilde, segði Høgni við Portalin, at nýggja fløgan er væl ávegis við at verða ljóblandað. Hon verður ljóðblandað í Belgia av Luc Van Acker, og arbeiðið gongur framá.

Høgni er væl nøgdur við ljóðblandið. Hann segði, at hann valdi at fara aðra staðni enn Føroyar og Danmarkar at ljóðblanda, tí næstan allar føroyskar fløgur verða ljóðblandaðar av somu fólkum í hesum londum. Við at fara til Belgia er møguleiki fyri at fáa eitt annað ljóð enn tað, sum vanliga merkir føroyskar útgávur.

**nud**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!